# Nýggjasta nýggja innan klædnamótan

MÓTI
*Henrietta Hammer*
*henrietta@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian vang*

Í gjárkvøldið skipaðu mótahandlarnir í SMS fyri forkunnugari mótasýning, har allar handlarnir sýndu fram tað nýggjasta innan mótaheimin.

Modellirnar vóru serliga litfagrar og vakrar - og ikki minst var tað áhugavert at síggja serligu klæðini, sum okkara Elisa Heinesen hevur sniðgivið.

Klæðini hjá henni vóru svørt og ógvuliga stílfull.

Sýningin var sera undirhaldandi - og uttan iva man onkur hava funnið sín kjóla til jólar, men vit lata myndirnar tala fyri seg:









